í stuttum

Lagt til rættis: Eyðun Klakkstein



## Washington best umtóktur

Amerikanska Harris Poll ger afturvendandi metingar av, hvørjir eru eru teir best umtóktu sjónleikararnir í USA. Í nýggjasta yvirlitinum er tað fyri fyrstu ferð í longri tíð, at Tom Hanks ikki er ovastur á listanum. Hann má lúta fyri Denzel Washington, sum sambært Harris Poll er best umtókti sjónleikarin í USA. Tom Hanks er nummar 2, John Wayne nummar 3, Clint Eastwood 4, Will Smith og Julia Robert nummar 5, Johnny Depp og Mel Gibson nummar 7, George Clooney 9 og Harrison Ford nummar 10.

## Høg modell tveitt úr bussinum



Tann 180 sentimetrar høga bretska modellin Josephine Kime var úti fyri eini heldur sjáldsamari hending í London nú um dagarnar. Hon fór upp í ein buss í enska høvuðsstaðnum, men var so biðin um at fara úr aftur bussinum. Josephine kom at standa í bussinum, og bussførarin segði, at hann sá einki í speglinum orsaka av teirri høgu modellini.

- Fyrst helt eg, at bussførarin skemtaði, men so ótolnaðist hann og gjørdist illur, og eg mátti úr bussinum, greiðir Josephine frá.

Ein talsmaður fyri bussfelagið hevur biðið um umbering fyri hendinga, men tað hevur ikki eydnast at funnið fram til, hvør bussførarin var, skrivar The Sun.



## Rullukøka ella køkurulla

Hóast rullukøka og køkurulla eru sett saman av somu orðum og kundu fyri tann skuld verið tvær síður av somu søk, er tað stórur munur hjá manni, sum kemur heim úr býnum móti morgni, um konan bjóðar honum rullukøku ella stendur klár við køkurulluni.

## Kinesarar banna film



Nýggi filmurin hjá Martin Scorcese verður ikki vístur í Kina. Orsøkin er, at kinesisku myndugleikarnir eru stak misnøgdir við, at teir í filminum verða lagdir undir at stjala datatøkni til ólógligt virksemi. Kinesarar hava biðið um, at hetta verður tikið úr spælifilminum, men hesum ynski hava farmleiðararnir sjálvsagt ikki gingið á møti.

Í filminum spæla kendir sjónleikarar sum Leonardo DiCaprio, Matt Damon, Jack Nicholson og Martin Sheen, og filmurin verður mettur at hava góðar møguleikar at vinna onkra Oscar-virðisløn í februar.

## 2007 verður Tintin-ár



Sosialurin

Í ár eru tað liðin 100 ár, síðani belgiski teknarin Hergé var borin í heim, og tað skal veruliga haldast í heimlandinum hjá honum. Hergé var serliga kendur fyri teknirøðina um Tintin, sum er víðakend og framvegis sera væl umtókt. Nógv verður gjørt burtur úr at markera serliga árið í Belgia, og eitt nú verða bygningar og tok skrýdd við tekningum av Tintin. Á myndin verður ein slík tekning avdúkað, meðan seinna konan hjá Hergé, Fanny Rodwell-Vlaminck er hjástødd.